

Mari og Janus í Løðuni, Silja og Jógvan Karstin
B.Prinsessevej B. 1506
3920 Qaqortoq
Grønland
marifp_81@hotmail.com
janusil_77@hotmail.com
Konto: 6460 - 3632840

**Heimasídan**
**www.hebron.fo**
**er virkin aftur**

**Kontonr. hjá**
**HEBRON**
Bank Nordic: 6460-9847040
Eik: 9181-4381124

**Ábyrgd av húsinum í oktober mánaði:**
**Birgith og Krisjan**
**Súsanna og Hallur**

### *Tíðindaskriv frá Mari og Janus*

Mari takkar hjartaliga fyri tíðina mikumorgun, tá ið kvinnurnar hittust. Tað var sera uppmuntrandi og uppbyggjandi.

Hin 28.09 fóru vit av landinum. Vit millumlendu í Danmark og fóru so víðari til Grønlands. Vit vóru fyrst í Maniitsoq, Sukkertoppen, har Omma Mari býr og vóru vit sera fegin um at síggja familjuna aftur! 10.10 fóru vit til Nuuk, har Mari luttekur á einum ráðgeva-raskeiði v/Clair og Clara Schnupp úr Kanada. Umleið 15. 11 fara vit til Qaqortoq. Børnini fara at byrja í vøggustovu og barnagarði. Vit umhugsa at hava eitt "jóla-barnamøti" ein leygardag í Desember. Mari er sett til at eiga 12. Januar. Hon hevur tað ikki gott í rygginum og í kokuni, tó gongur graviditeturin væl. Vit takka fyri, at tit minnast okkum í bønum tykkara og takka fyri allan stuðulin, tit hava víst okkum.

***Takkarevni:***
Takki Gudi fyri at Hann hevur varðveitt okkum á ferðini higar til.
Takki Gudi fyri at vit fingu væl burtur úr skeiðinum í Sveits.
***Bønarevni:***
Biðið fyri Mari at hon skal hava orku til at taka ráðgevaraskeiðið.
Biðið fyri børnunum, at tey trívast á ferðini og tá ið tey byrja í barnagarði og vøggustovu.
Biðið fyri Mari nú hon ber barnið og ofta hevur pínu, og biðið fyri, at barnsburðurin skal ganga væl.
Biðið fyri Janus, tá ið hann skal ansa børnunum, meðan Mari er á ráðgevaraskeiðnum

### Bønarevnir:

**At biðja fyri Teiti og hansara familju.** Støðan hjá Teiti er ikki góð í løtuni. Hann fær viðgerð fyri svamp í heilanum, og hevur verið ógvuliga ússaligur. Tó er onkur glotti at hóma. Í gjár hevði hann verið í brúsu, og í dag hevði hann biðið um at fáa telduna, so tað eru ja-lig tekin. - Jórun og Virgar skiftast um at vera um hann, og Vilbjørg er komin heim. Katrin, systir Jórun, var niðri eftir henni.— Hetta er ein sera hørð tíð fyri tey øll, og tey hava tørv á, at vit minnast tey, og tey virðismeta tað høgt.
**At biðja fyri Páll**, sum enn er í Grønlandi.
**At biðja fyri Mari, Janus og børnunum**, sum nú eru farin yvir til Grønlands - sí tíðindabrævið omanfyri.
**At biðja fyri Jórun og Kalla,** sum virka millum sigoynararnar í Serbia.
**At biðja fyri ungdóminum - at biðja fyri teimum sjúku og veiku og teimum, ið ikki hava tað so gott og at biðja fyri hvør øðrum.**

***BØN - ER LYKILIN TIL SIGNING - BØN - ER***

November 2011

# HEBRON Á ARGJUM

- kunning, tíðindi og møtiskrá



Á bønartíð, á tíð so góð! Tú gevur hvíld til hjørtu móð;
Mín andi tráar eftir tær og frøir seg, tá tú ert nær.
Tá leiti eg til staðin tann, har eg við Gudi møtast kann
og kasti tað, sum tyngir meg,
á bønarstund, og njótii teg!

Hjartaliga vælkomin í HEBRON

## November 2011

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Mikudagur** | 2. | Kl. 10:00 | Bønarløta fyri kvinnur - allar kvinnur eru vælkomnar |
| | | | ***Vegna samfelagsstevnuna í Ebenezer eru húsbólkarnir avlýstir hesa vikuna*** |
| **Sunnudagur** | 6. | | ***Einki møti og eingin sunnudagsskúli vegna samfelagsstevnuna í Ebenezer. - Víst verður til barnamøtið í Ebenezer kl. 12.00, har fólk úr Hebron luttaka við einum leiki.*** |
| **Týsdagur** | 8. | Kl. 19.00 | Squash - bíbiliuløta fyri ung í 5.—8. flokki |
| **Mikudagur** | 9. | Kl. 10:00 | Bønarløta fyri kvinnur - allar kvinnur eru vælkomnar |
| | | Kl. 20:00 | Húsbólkar og tí einki møti í Hebron |
| **Sunnudagur** | 13. | Kl. 10:00 | Bønarløta |
| | | Kl. 10:30 | Morgunmøti og barnaansing |
| | | Kl. 12:00 | Sunnudagsskúli |
| | | Kl. 12:00 | Møti. Djóni Thomassen talar: Heilaggering |
| | | | Møtileiðsla: Krisjan og Birgith |
| | | | Teldan: Sigrid |
| | | | Barnaansing: Mai og Marni, Valbjørg og Hanus |
| | | | Drekka: Poula og May-Britt |
| | | Kl. 19:00 | Ungdómsløta hjá Árna Neshamar - Firm Foundation |
| **Mánadagur** | 14. | Kl. 21.00 | Ráðleggingarfundur - øll eru vælkomin |
| | | | Vit tosa um tiltøk í jólamánaðinum og annað. |
| **Mikudagur** | 16. | Kl. 10:00 | Bønarløta fyri kvinnur - allar kvinnur eru vælkomnar |
| | | Kl. 20:00 | Bíbliutími og bønarløta. Djóni Thomassen talar um Rómbrævið |
| **Sunnudagur** | 20. | Kl. 10.00 | Bønarløta |
| | | Kl. 10:30 | Morgunmøti og barnaansing |
| | | Kl. 12:00 | Sunnudagsskúli |
| | | Kl. 12:00 | Møti. Jógvan Jacobsen talar um Efesusbrævið |
| | | | Møtileiðsla: John og Annika |
| | | | Teldan: Rúni |
| | | | Barnaansing: Joan og Eiler, Heidi og Jákup |
| | | | Drekka: Bjørg og Ruth |
| | | Kl. 19.00 | Ungdómsløta hjá Lindu, Esbern og Marius—Tey ungu skipa fyri |
| **Týsdagur** | 22. | Kl. 19:00 | Squash - bíbliuløta fyri ung í 5.—8. flokki |

## November 2011

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Mikudagur** | 23. | Kl. 10:00 | Bønarløta fyri kvinnur - allar kvinnur eru vælkomnar |
| | | Kl. 17:30 | Familjudøgverði og bønarløta |
| **Sunnudagur** | 27. | Kl. 10:00 | Bønarløta |
| | | Kl. 10:30 | Morgunmøti og barnaansing |
| | | Kl. 12:00 | Sunnudagsskúli |
| | | Kl. 12:00 | Møti. Sverri Steintún talar |
| | | | Møtileiðsla: Allan og Katrin |
| | | | Teldan: Sigrid |
| | | | Barnaansing: Marianna og Bjarni, Heidi Ljósheim og Noomi Ósá |
| | | | Drekka: Ása Ósa og Inga |
| | | Kl. 19:00 | Ungdómsløta hjá Anniku Ljósheim - Firm Foundation. |
| **Mikudagur** | 30. | Kl. 10:00 | Bønarløta fyri kvinnur - allar kvinnur eru vælkomnar |
| | | Kl. 20:00 | Bíbliutími og bønarløta. Djóni Thomassen talar um Rómbrævið |
| **Sunnudagur** | 4.dec. | Kl. 10:00 | Bønarløta |
| | | Kl. 10:30 | Morgunmøti og barnaansing |
| | | Kl. 12:00 | Sunnudagsskúli |
| | | Kl. 12:00 | Møti. Djóni Thomassen: Heilagi Andin |
| | | | Møtileiðsla: Marni og Mai |
| | | | Teldan: Rúni |
| | | | Barnaansing: Katrin og Allan, Vónbjørt og Djóni |
| | | | Drekka: Birgith og Ása á Dul |
| | | Kl. 19:00 | Ungdomsløta |

**Samfelagsstevnan í Ebenezer** verður frá mikudegnum 2. november til sunnudagin 6. november. Nærri verður lýst í bløðunum og á heimasíðuni www.ebenezer.fo .

**Húsbólkarnir møtast hjá hesum:**

Bólkurin hjá Ruth og Thorvald: Inga, Norðurrás 10, Tórshan
Bólkurin hjá Jóngerð og Rúna: May-Britt og Dánjal Jákup, undir Gráa Steini 54
Bólkurin hjá Monu og Sverra: Marjun Vilhelm, Lambagerði 2, Tórshavn
Bólkurin hjá Ceciliu og Jonhard: Solveig og Jákup Andreas, Heiðatún 7, Argir

**Viðtala í Hebron**
Jógvan Jacobsen hevur viðtalu í Hebron hvønn hósdag millum kl. 14—kl. 18. Tú ert hjartaliga vælkomin at hittan hann.